LØGTINGIÐ

**Løgmansskrivstovan og stjórnarráð**

Løgtingið

5. juli 2024

**Kunning um freistir í sambandi við tingmál løgtingsárið 2024**

Á ólavsøku 2024 koma broytingarnar í § 38 í Tingskipanini í gildi, sum vóru samtyktar í løgtingsmáli nr. 106/2023. Hetta merkir, at freistirnar fyri, nær mál skulu latast tinginum undan framløgu, verða longdar.

Vanlig tingmál, sum ikki verða løgd fram uppundir evstu freist sambært § 54, skulu nú vera Løgtinginum *í hendi kl. 12 tann 6. yrkadagin frammanundan framløguni.*
Mál, sum skulu leggjast fram uppundir evstu freist, skulu nú vera tinginum *í hendi kl. 12 tann 12. yrkadagin frammanundan framløguni.*

Freistirnar fyri tingárið 2024 verða tí hesar:

- Uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri 2025 og møgulig fylgilógaruppskot skulu latast tinginum 23. sept. 2024. Framløga verður 30. sept.
- Uppskot, sum skulu hava gildi frá ársbyrjan 2025, skulu latast tinginum 21. okt. 2024. Framløga verður 4. nov.
- Uppskot til møguliga eykafíggjarlóg skal latast tinginum 22. nov. 2024. Framløga verður 29. nov.
- Uppskot, sum skulu verða viðgjørd í komandi tingári, skulu latast tinginum 21. februar 2025. Framløga verður 7. mars.
- Uppskot til játtanarkarmar skal latast tinginum 24. mars. Framløga verður 31. mars 2025.

Møguleiki er framvegis fyri fráviki og framløgu við 17 undirskriftum, um freistirnar til framløgu í ávikavist novembur og mars ikki verða hildnar.

Vinaliga

Johnhard Klettheyggj
løgtingsstjóri

Tinghúsvegur 1-3 | Postboks 208 | FO110 Tórshavn | Faroe Islands

logting.fo